# 5 spurningar um jól



## Jákup Sverri Kass

***Hvat heldur tú um jólini?***
Eg havi altíð verið sera glaður fyri jólini. Fyri meg eru jólini ein tíð, har man kemur saman við familjuni og vinunum. Nakað av tí besta við jólunum er tíðin beint áðrenn sjálvar jóladagarnar. Tíðin, har jólatrøðini og jólapynt prýða gøtur og gluggar. Eg má viðganga, at tað tekur eitt sindur av glansinum, tá ið krambúðirnar byrja at pynta og lýsa við jólunum – mitt í oktobur.

***Hvussu vóru jólini sum barn?***
Tá ið eg var barn, hildu vit altíð jól heima hjá mammu og babba í Álvastíggi. Omma, abbi og gubbi komu úr Vestmanna og búðu hjá okkum um jólini. Um morgunin var Disney-teknifilmur í sjónvarpinum, og á middegi stóð ræstur fiskur og speril á borðinum. Aftaná døgurða gekk leiðin út í Vesturkirkjuna. Ímeðan vit onnur vóru í kirkju, passaði abbi ræsta kjøtið í ovninum. Ræsta kjøtið kom á borðið um nátturatíð, og aftaná ótu vit rís a la mande. Ikki fyrr enn aftaná rís a la mande sluppu vit fram at jólagávunum, sum jólamaðurin sjálvandi kom við.

***Hvussu heldur tú jól?***
Síðan eg bleiv giftur og fekk børn, hava vit skiftivís verið hjá mínum foreldrum og svigarforeldrunum. Jólaaftan hjá einum og 1. dag hjá hinum. Tó so, at tað eru bara 5 minuttir ímillum húsini, so vit síggjast øll báðar dagarnar. Hendan avtalan virkar væl – tó við einum trupulleika. Foreldrini hjá mær hava ræst kjøt jólaaftan og dunnu/gás 1.dag – svigarforeldrini í Gundadali hava umvent. Úrslitið er, at annaðhvørt ár fáa vit ræst kjøt báðar dagarnar, og annaðhvørt ár fáa vit dunnu/gás báðar dagarnir. 2. jóladag havi eg/vit ikki nakað fæst - tá gangi eg bara og eti restir, har sum eg kann koma fram at. Eg taki vanliga 3-4 kg uppá um jóltíðir og fram til nýggjár. Tað má vera tað – onkuntíð má man kunna synda eitt sindur.

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Í ár verða jólini eitt sindur annarleiðis enn vanligt. Vit hava verið heima í Føroyum hvørji jól síðan vit í 2001 fluttu til Árhus í lestrarørindum; men av tí at vit bæði (vónandi) verða liðug í summar, so hava vit avgjørt at verða verandi í Árhus á jólum í ár. Tað verður eitt sindur løgið at hoyra jólaevangeliðið á donskum. Her á kollegiunum búgva nógvir føroyingar, so vit verða ikki heilt einsamøll. Konan hevur eisini eina fastur, sum býr tætt við. Hana fara vit at vitja 2.jóladag. Spurningurin er bara, hvat fyri siðvenjur fara at verða galdandi hjá okkum. Eg vil gjarna halda fast við ræsta kjøti jólaaftan og dunnu 1. dag; ímeðan konan vil tað umvenda. Eg veit ikki, hvussu vit fara at loysa trupulleikan - vit mugu bara trekkja lut ella skiftast annaðhvørt ár...

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu í ár?***
Eg eri farin at ivast í, um eg fái nakra jólagávu í ár. Síðan vit fingu børn hava tey fingiðallar gávurnar, nei tvætl. Eg ynski mær onki serligt; plagi fyri tað mesta at fáa klæðir - tað er fínasta slag.


























